Einki at gera - og tó

Ofta ver›ur tiki› til, at her heima á hesum einsamøllu klettum, er einki at takast til út yvir ta› vanliga.

Gaman í ber til at fara ein gongutúr oman móti Vaglinum, ella kanska í biograf at hyggja eftir onkrum filmi, men út yvir hetta, er líti› og einki at takast vi›.

Hetta er eisini eitt av teimum evnum, sum trivi› ver›ur í hesu fer›. Hvat ver›ur gjørt fyri ungdómin í dag, og hvussu kann hetta betrast.

Mong eru í øllum førum samd um, at alt ov líti› er at takast vi›, og at ta› eru ov fá, sum royna at ví›ka um hetta útbo›i›.

Tó eru ta› ikki øll, sum eru samd í, at ov líti› er at gera. Ella er ta› bara ta›, sum ein sjálvur ger ta› til?

Í øllum førum hava vit eisini hitt nakrar ungar mans, sum royna seg á nøkrum somiki› forkunnugum sum eitt snowboard, ella kanska eitur ta› kavafjøl.

Vanliga er hetta bert naka›, sum vit kunnu hyggja eftir í sjónvarpinum, og tá munnu vit helst vera samd um, at hetta sær øgiliga stuttligt út.

Jú men, vit hava ongantí› nakran kava her í Føroyum, sigur tann atfinningarsami kanska, men hetta hevur so ikki for›a› hesum dreingjunum. Ver›ur fari› nóg høgt upp, hava vit kava stóran part av árinum, og túrurin ni›an á Sornfelli er ikki longri enn sum so, at ta› væl letur seg gera at fara hagar. Vilt tú hava meira at vita um hetta, so er bara at bla›a ví›ari her í bla›num.

Tónleikatindarnir eru sjálvandi eisini vi› í bla›num, ta› eiga teir jú at vera, og hin fasti teigurin, fløguummælini er sjálvandi aftur at síggja. Dagfinn hevur aftur veri› í 3'aranum, har hann hevur funni› tríggjar spennandi fløgur afturat, sum hann hevur skriva› sína hugsan um. Eru tær verdar at keypa ella?

Hetta var so naka› av tí, sum er vi› í Yngd hesu fer›. Hevur tú ella tit onnur hugskot, eru tit altí› vælkomin at senda okkum ein teldupost á yngd@sosialurin.fo. Skriva› bara eitt líti› bræv, har tú nevnir títt uppskot, so ert tú vi› í lutakastinum um fløguna frá 3'aranum.

Yngd SOSIALURIN

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum

Hvønn mikudag

Send inn og vinn

3 arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd". Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3'aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Standa á snowboard á Oynni

F‡ra ungir argjamenn hava eitt anna›lei›is frítí›arítriv, nevniliga at standa á snowboard. Hetta ítriv er n‡tt fyri føroyingar, men er ikki n‡tt í sjálvum sær.

Teir f‡ra, Rúni Thomsen, Regin Thomsen, Tórur Andreasen og Bár›ur Højgaard hava snowboarding til frítí›arítriv. Teir standa sum oftast á Oynni, tí umstø›urnar eru gó›ar har, av tí at har er bratt, og nógvur kavi, tá ta› nú einafer› er kavi, væl at merkja. - Ta› er ein avmarking í sjálvum sær, at ein ikki fær sta›i› oftari, men ta› má ein bara liva vi›, siga teir.

Byrja›i vi› tveimum

Ta› byrja›i vi› at Bár›ur og Rúni keyptu sær eitt snowboard, tá teir vóru í Rumenia fyri gó›um tveimum árum sí›ani. Sí›ani ta›, keyptu vinirnir hjá teimum sær eitt, eftir at hava roynt snowboardini hjá teimum. Solei›is hevur gongdin veri› seinastu tvey árini, og nú eru teir sjey, sum eiga snowboard.

Teir grei›a frá, at teir ofta gera túrar ni›an á Sonnfelli, tá ve›ri› og tí› er til tess. Túrarnir eru sera spennandi og ta› hendir altí› okkurt n‡tt. Tó var ta› ikki møguligt at koma allan vegin ni›an á Sonnfelli hendan dagin, tí at ov nógvur kavi var á vegnum.

Eru sjálvlærdir

Av tí at snowboarding er so óvanligt í Føroyum, er ta› ikki lætt at fáa hjálp ella rá›føra seg vi› nakran. Tískil eru teir sjálvlærdir. Hóast ta›, hava Regin og Tórur veri› á feriu í Eysturríki í eina viku, har teir lærdu seg at standa á snowboard rættuliga. Bár›ur og Rúni, sum byrja›u ta› heila, hava bert lært seg sjálvan, og ta› er næstan líka gott, siga teir.

Tá teir vór›u spurdir um teir hildu, at ein markna›ur hev›i veri› fyri snowboardsølu í Føroyum, søgdu teir, at ta› mettu teir so avgjørt. - Áhugin er alsamt vaksandi millum ung fólk, nú meiri fólk eru gjørd varug vi› at hetta er eitt ítriv, sum væl letur seg gera í Føroyum, løgdu teir aftrat.

Eitt sámuliga gott snowboard kostar 2-3000 kr. í Danmark. Harafturat koma klæ›ir, handskar, skógvar, o. a. sum n‡tt ver›ur til endamáli›. Sostatt kann prísurin gerast stórur, um ein skal hava alt vi›. Ein teirra sigur seg hava n‡tt gó›ar 6000 kr., men leg›i dent á, at einum n‡tist ikki at keypa alt ta›, hann hevur keypt. Teir vístu eisini á, at ein væl kann klára seg vi› einum snowboardi og vanligum kavaklæ›um, sum flest øll fólk eiga.